## Lisbeth L. Petersen

Uppvaksin við politikki. Í familjuni eru fleiri generatiónir av politikarum, og abbin var fyrsti løgmaður eftir heimastýrislógina. Pápin var blaðstjóri á Dimmu, sum tá var eitt agitatiónsblað hjá Sambandsflokkinum. Var ung, tá hon byrjaði í politiskum arbeiði, og var eisini virkin í kvinnufelagsarbeiði. Verið býráðslimur og býráðsformaður í Havn, fólkatingslimur og tinglimur.



*Tað ringasta er, tá tíni egnu ganga ímóti tær. Tað er óbehagiligt*
*Lisbeth*

# Ert tú **nærtøkin** hev

**Sonur Heidi Petersen legði seg í songina at gráta, tá ið hon varð vald í Løgtingið. Lisbeth L. Petersen heldur, at tað ringasta er, tá ið tíni egnu ganga ímóti tær, og Annita á Fríðriksmørk ger greitt, at skulu kvinnur verða við í politikki, mugu tær spíska albogarnar beinanvegin. Vit hava hitt tær tríggjar løgtingskvinnurnar til eitt prát um teirra upplivingar í politikki**



***Tríggjar einsamallar kvinnur og 29 menn mannað tingið. – Tað kemur ofta fyri, at vit undir tingfundum hugsa, at her eru avgjørt ov fáar kvinnur við til at mynda føroyska politikkin. Mynd: Jens Kristian Vang***

## Kvinnupolitikkur



**Eydna Skaale**
eydna@sosialurin.fo

Lisbeth L. Petersen, Annita á Fríðriksmørk og Heidi Petersen eru einastu kvinnurnar, sum hetta valskeiðið hava arbeitt í løgtinginum.

Ein gerandisdag í september hittu vit tær til eitt prát um kvinnuliga umboðan á tingi, um teirra royndir í politiska arbeiðnum, og hvat kann betra um kvinnuligu umboðanina í løgtinginum.

*Er tað ein tung avgerð at lata seg uppstilla fyrstu ferð?*

*Annita:* Fyrstu ferð, eg var uppstillað, var til fólkatingsval í 1991. Tað var eitt stórt stig, og eg var hjartkipt. Eg var við í Norðurlandahúsinum og skuldi halda eina lítla røðu. Eg skrivaði hana 14 dagar frammanundan, og so lærdi eg hana uttanat. Eg var ræðuliga nervøs. Men so varð eg aftur uppstillað til næsta fólkatingsval, og at enda til løgtingsvalið í 98. Tá var tað ikki ein tung avgerð.

*Lisbeth:* Eg var heilt ung, tá eg stillaði upp fyrstu ferð, men tað var mest tí, at teir bara skuldu hava onkra kvinnu á listan. Eingin roknaði við, at eg fór at koma inn, so tað var ikki ein tung avgerð. Men mín elddópur kom í 84, tá eg stillaði upp til kommunuvalið. Eg hevði ongan áhuga fyri kommunalpolitikki, kom bara á listan fyri at hjálpa einum øðrum. Men tá avtornaði, kom eg einsamøll inn. Tað var torført.

*Heidi:* Tað var av tilvild, at eg stillaði upp. Eg var formaður í Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag, og vit høvdu funnið okkara valevni. Men so leyp ein frá. Vit royndu at finna nýtt valevni, men uttan úrslit. At enda hugsaði eg, "okey, eg geri hetta bara. Hetta kostar 3 vikur av mínum lívi, og so havi eg roynt tað. Eingin væntaði, at eg fór at koma inn. Men tá eg segði ja, so fór eg heilhjartað inn í kampanjuna.

*Hvussu er løtan so, tá atkvøðurnar eru taldar upp, og úrslitið vísir, at tit eru valdar?*

*Heidi:* Ta løtuna blíva fólk púra ør. Og at eg var sloppin inn, var eitt totalt sjokk. Eg var glað, skelkað, forfard og ærað, tað var kaos. Nógv fólk kom inn á gólvið. Men sonurin legði seg í seingina at gráta. Hann segði, at "nú fert tú á ting, og eg fari ongantíð at síggja teg aftur." Tað kvøldið lovaði eg, at eg skuldi keypa okkum báðum fartelefon, soleiðis, at hann altíð kundi fáa fatur á mær.

*Lisbeth:* Tá eg var vald inn í býráðið fyrstuferð, hugsaði eg: "klári eg hetta?" Hini býttu seg í tveir partar, og eg stóð einsamøll í miðjuni. Annar parturin beyð mær alt uttan formanssessin, meðan hin bara beyð mær formanssessin. Eg valdi at taka tað mest læruríka, og segði tí nei til at vera býðráðsformaður. Tá eg ikki tók av formanssessinum, vóru nógvar kvinnur eftir mær. Tað var sera óbehagiligt. Men eg var glað fyri mína avgerð, tí eg lærdi øgiliga nógv tey árini.

*Annita:* Tá eg kom inn, var ein røringur í fólkinum, tí fullveldið var veruliga komið á dagskránna tá. Vit vóru trý nýggj og ung valevni, sum komu inn. Eg var 29, Høgni var 30 og Páll var 31, og tað lá stór ábyrgd á okkum, tí fólkið væntaði, at nú skuldi okkurt henda við fullveldinum. So beinanvegin valnáttina høvdu vit samráðingar um at skipa samgongu. Og tað eydnaðist.